GEVALIAGEVALIAGEVALIAGEVALIAGEVALIAGEVALIAGEVALIAGEVALIA

Vit nærkast 3. drátti

— teimum 20 túsund krónunum



3. dráttur 20/12-85

1 vinningur á 20.000 krónur
1 vinningur á 5.000 krónur
8 vinningar á 12 pk. GEVALIA

Postsendið Gevalia-lokin »tey brúnu« til Postbox 16 - 3800 Tórshavn

Jú fleiri lok — tess størri møguleikar.

Góðan GEVALIA-drátt

Áður innsend lok koma eisini við í 3. drátti.

GEVALIAGEVALIAGEVALIAGEVALIAGEVALIAGEVALIAGEVALIAGEVALIA

KUNNGERÐ

um broytingar í býarskipanini og byggisamtyktini fyri Vágs kommunu

Við heimild í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 og løgtingslóg nr. 48 frá 21. mai 1974, verður við hesum boðað frá, at Vágs kommuna hevur ætlanir um at gera ávísar broytingar í galdandi býarskipan og byggisamtykt 1985-1995.

Broytingarnar umfata:

Víðkað bústaðarøkið B 1 á Gjógvarábøi, víðkað havnarøkið D 1 á Tjørn millum høvuðsgøtuna og fiskavirkið hjá P/f Polarfrost, víðkað ídnaðarøkið D 2 á Oyrunum og útlegging av nýggjum ídnaðarøki D 3 í Langadølum.

Broytingarnar hava við sær,

at matr. nr. 340, 417b, 433, 478a, 500a, 500a, 503a, 504a, 519, 520, 521 og 523 verða løgd til bústaðarøkið B1,

at matr. nr. 154b, 155, 164, 165, 166, 167, 169 og 171 verða løgd til havnarøkið D 1,ä

at matr. nr. 363a verður lagt til ídnaðarøkið D 2 og

at matr. nr. 56,331a og 488 verða løgd til ídnaðarøkið D 3.

Kort og onnur skjøl, ætlaðu broytingunum viðvíkjandi, liggja frammi fyri áhugaðum á kommunuskrivstovuni í Vagi frá mánadegi 2. desember til mánadagin 23. desember 1985.

Møgulig mótmæli og/ella broytingaruppskot, ið skulu vera skrivlig, skulu vera Vágs býráði í hendi í seinasta lagi 2. mars 1986.

VÁGS BÝRÁÐ
27. november 1985

EL-HANDILIN Í NORÐDEPLI

komfýrar
vaskimaskinur
køliskáp
frystiboksir
útleigan av videofilmum

Vit hava eisini onnur húsarhaldstól sum strúkijørn, rakimaskinur o.a.

Handilin er opin soleiðis:
Mánad.-friggjad. 9.00-12.00 — 13.00-17.00
Leygardag 9.00-14.00

HANUS HANSEN
Góðk. el-innl.
Tlf. 52141 — 3874 Norðdepli

Landssjúkrahúsið

3800 Tórshavn

Søkt verður eftir manni við útbúgving sum elektrikari í 5 mánaðir til setan skjótast gjørligt.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og Starvsmannafelagið ella Føroya Landsstýri og Føroya Handverkarafelag.

Umsókn við avriti av sveinabrævi og møguligum viðmælum frá fyrrverandi plássum verður sum skjótast at senda til umsjónarmannin, Landssjúkrahúsið, 3800 Tórshavn.

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
DRONNING ALEXANDRINES HOSPITAL

TELEF. 13540 - LOKAL NR.

Fuglar til sølu

Dvørgapapageykar, undulatar og kanariufuglar til sølu.

Telf. 14434



Lýsið í **sosialinum**

Lystiliga prentar
estra
í Gøtu, tlf. 41085
Vit gera hvat vit kunna — og kunna tað vit gera.

BERGMENN
spæla allan tónleik til dans fyri rímiligan penga.
Tlf. 16134

Starvsfólk

Søkt verður eftir vaksnum fólki m/k til Burger No. 1.

Áhugað ringið tlf. 17441 ella 17818